# Øll eiga onkran í ferðsluni



*Magnus Gunnarsson*
*blaðmaður*



*Her er ein krasjtest á FDM Sjællandsringen, sum vísir hvat hendir, tá ein lastbilur við 70 km/t koyrir á fýra parkeraðar bilar*

Øll eru vit meira ella minni við í ferðsluni, bæði tey sum koyra ella ganga, eins og tey sum av eini ella aðrari ørsøk ikki kunnu koma út um gáttina. Tá ein álvarslig ferðsluvanlukka rakar, so hevur hon stórar ringvirkningar á familju, vinir og kenningar. Tey avvarðandi kenna seg rakt av vanlukkuni á ein ella annan hátt.

Vit fegnast um at ein arbeiðsbólkur nú er settur og farin til verka við at kanna møguleikarnar fyri at gera eina koyritekniska breyt í Føroyum. Tað hevur í mong ár verið ynski um at fáa eina venjingarbreyt við hálkubreyt, har bilførarar kunnu læra grundleggjandi atburð í ferðsluni við ymiskum akførum sum t.d. persónbilum, lastbilum, bussum og motorsúkklum og læra týdningin av at laga ferð, stýring og bremsing eftir umstøðunum og at royna vandamiklar støður í tryggum umhvørvi.

Tað er væl kent her hjá okkum, at ungir menn koyra fullkomiliga ørt í gøtunum - serliga um næturnar. Í Malmø í Svøríki var hetta eisini ein stórur trupulleiki fyri nøkrum árum síðan.

Í eini grein í donsku avísini Urban verður víst á hvussu myndugleikarnir í Malmø loystu trupulleikan við ólógligari rasarakoyring í býnum. Fenomenið sum teir nevna “illegal streetrace” førdi eisini til fleiri ógvusligar ferðsluvanlukkur. Ein koyribreyt varð gjørd til tey ungu at avreagera á undir skipaðum umstøðum. Hetta førdi við sær, at hesi sonevndu streetrace á vanligu koyrivegunum hildu uppat og harvið eisini álvarsligu ferðsluvanlukkurnar.

Okkara vón er, at vit um nøkur ár fáa eina koyritekniska breyt við hálkubreyt í Føroyum til frama fyri ferðslutrygdina og harvið alt Føroya fólk.

---

**BILAR – serblað í Sosialinum oktober 2009**

**ÚTGEVARI**
Sp/f Sosialurin

**BLAÐFÓLK**
Magnus Gunnarsson
*maggi@sosialurin.fo*

**MYNDAFÓLK**
Jens Kristian Vang
Álvur Haraldsen

**LÝSINGAGERÐ**
Kári við Rættará

**PRENT**
P/F Prentmiðstøðin

Síðan 1995 hevur Sosialurin havt fastan bilteig í blaðnum. Teigurin er í blaðnum hvønn mikudag. Endamálið er m.a. at kunna um tað sum rørir seg á bilamarknaðinum, bilsøgu og um ferðslutrygd.

Síðan 2000 hevur Sosialurin á hvørjum ári givið út serblað um bilar.

C Sosialurin 2009

